RÁÐGEVARAFELAGIÐ

Várið 2024

# FØROYSK RÁÐGEVING

Arkitektar | Verkfrøðingar | Byggifrøðingar



## Trupla javnvágin millum bústaðatørv og býarsamleika

## Bygging má virða mørkini hjá Jørðini

## Fingu optimalt burtur úr kørgum umstøðum

**Útgevari**
Ráðgevarafelagið
Óðinshædd 7
FO-100 Tórshavn
industry@industry.fo

**Skrivað**
Óluva Zachariasen
oluvazac@gmail.com

**Layout**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

**Prent**
Føroyaprent

**Kápumynd**
Nólsoyar bygd

**Upplag**
500 eintøk

## Føroysk ráðgeving

Ráðgevarafelagið, sum er felagið hjá arkitektafyritøkum, verkfrøðingafyritøkum og byggifrøðifyritøkum í Føroyum, hevur latið gera hetta blaðið. Endamálið hjá felagnum er at savna ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni, at útinna felags áhugamál.

Felagið varð stovnað í 2008 og heldur til í Vinnuhúsinum.

Føroysk ráðgevaravinna er nógv ment seinastu áratíggjuni, og avrikini hjá føroyskum ráðgevarum eru mong og fjølbroytt, eins og sæst í blaðnum. Áhaldandi minnir Ráðgevarafelagið á, at føroyskir ráðgevarar skulu hava líka góðar møguleikar at bjóða upp á verkætlanir sum útlendskar fyritøkur.







**4** Leiðari

**6** Trupla javnvágin millum bústaðatørv og býarsamleika

**10** Bygging má virða mørkini hjá Jørðini

**14** Fingu optimalt burtur úr kørgum umstøðum



**19** Fyrstu DGNB-sertifiseraðu bústaðir í Føroyum

**23** Privatu kundarnir fyltu mest í 2022








5





> LANDSPOLITISKIR OG KOMMUNALIR BYGGIHARRAR TYKJAST IKKI AT HAVA STÓRAN ÁHUGA Í BURÐARDYGGARI BYGGING, SAMSTUNDIS SUM LÓGARKRØVINI TIL BURÐARDYGD ERU SERA VEIK

## Leiðari

# Mugu krevja meira burðardygd í byggivinnuni

**Árni Jakobsen, formaður í Ráðgevarafelagnum**

Altjóða tøl vísa, at áleið 40% av heimsins útláti av vakstrarhúsgassi stavar frá bygging og rakstri av bygningum. Samstundis vísa føroysk tøl, at upp ímóti 20% av allari orkunýtsluni her á landi verður nýtt til upphiting av bygningum[1].

Í flestu av okkara grannalondum hava tey í fleiri ár miðvíst arbeitt við at minka um orkunýtsluna í nýbygningum. Eisini verður arbeitt við gera sjálva bygginina meira umhvørvisvinarliga, bæði við lógarkravdum greiningum av umhvørvisávirkan av byggitilfari og øðrum sjálvbodnum sertifiseringum innan burðardygd.

## Veik lógarkrøv

Hóast grannalond okkara dúgliga virka fyri at gera byggivinnuna meira burðardygga, er støðan í Føroyum heldur øðrvísi. Vit standa nærum í stað – og kanska lata vit bara standa til.

Motivatiónin hjá føroysku byggivinnuni fyri øktum burðardyggum virksemi er enn avmarkað. Landspolitiskir og kommunalir byggiharrar tykjast ikki at hava stóran áhuga í burðardyggari bygging, samstundis sum lógarkrøvini til burðardygd eru sera veik.

Orkuramman í føroysku byggikunngerðini BK17 samsvarar við donsku krøvini í BR08 frá 2008, sum er omanfyri tað dupulta av markvirðinum fyri orkutørvin í donskum nýbygningum í dag. Eingi krøv eru til greining av ávirkan á lívmargfeldi. Eingi krøv eru um greiningar av útláti frá tilfarsnýtslu. Og bert fá krøv eru um handfaring, viðgerð og endurnýtslu av byggiburturkasti.

## Neyðug átøk

Tað er av stórum týdningi, at vit byrja at seta okkara fokus meira ítøkiliga á eina meira burðardygga menning av byggivinnuni. Fylgja vit ikki við altjóða rákinum, kann hetta hava bæði umhvørvisligar, sosialar og fíggjarligar avleiðingar fyri okkum. Vandi er eisini fyri, at tað kann gerast trupult at fáa fígging til bygging í framtíðini.

Nøkur átøk, sum myndugleikin eigur at gera beinanvegin, eru:

- Dagføring av byggikunngerðini BK17
- Seta krøv til burðadygga bygging
- Orkumerking av sethúsum og bygningum

## Saman um burðardygga byggivinnu

Halda vit áfram uttan ítøkilig átøk fram ímóti meira burðardyggum virksemi í byggivinnuni, mugu vit vera greið yvir, at hetta eisini er ein avgerð, ið verður tikin. Einki at gera er nevniliga eisini eitt val. Eitt val um at lata eyguni aftur fyri teirri ábyrgd, vit hava fyri okkara framtíðar ættarliðum og at framtíðartryggja bæði íløgur, umhvørvi og sosial viðurskifti.

Vit kunnu ikki blíva við at drála, men mugu saman byrja at arbeiða fyri eini meira burðardyggari byggivinnu.

[1] *www.us.fo/orka*

# TRUPLA JAVNVÁGIN MILLUM BÚSTAÐATØRV OG BÝARSAMLEIKA

**Tað er umráðandi at nøkta bústaðatørvin, men vit mugu samstundis tryggja, at vit eisini eru errin av okkara býi um 100 ár, sigur Birita Wardum, býararkitektur í Tórshavnar kommunu**

Eftirspurningurin eftir bústøðum í Tórshavnar kommunu er stórur. Serliga í Tórshavnarøkinum. Seinastu 10 árini er fólkatalið í kommununi vaksið úr 20.000 upp í 23.000 íbúgvar, og væntandi veksur talið 1,4% árliga fram til 2032.

Fólkavøksturin setir stór krøv til kommununa.

Nógvir íleggjarar bjóða seg fram at byggja bústaðir, og hesir hava stóran týdning fyri at nøkta eftirspurningin. Tó kann tað vera ein avbjóðing at fáa bústaðabygging at ganga hond í hond við ynskini um byggilistarliga samleikan í býnum, sigur Birita Wardum, býararkitektur og leiðari á Býarskipanardeildini í Tórshavnar kommunu.

## Balansugongd

– Hetta er ein balansugongd. Stórur tørvur er á bústøðum, men samstundis mugu vit varðveita býarsamleikan og tryggja, at býarmenningin í størsta mun tekur støði í føroyskum byggisiði.

Hon sigur, at kommunan eigur at stýra býarmenningini við byggisamtyktum, so har eru reguleraðar ásetingar at vísa á, tá ið íleggjarar koma við verkætlanum.

– Men siðvenjan innan byggisamtyktir í Føroyum er rættiliga ”grunn” Tað er ikki vanligt at áseta reglur um útsjónd, tilfar, stødd á vindeygum o.s.fr. í byggisamtyktum. Tískil eru reglurnar rættiliga leysar at tulka, tá ið tað kemur til heildarmyndina av tí bygda, sigur Birita Wardum.

Kommunan kann illa nokta við teirri grundgeving, at ein bygningur er ógvusligur ella ljótur, um hann annars heldur seg til byggisamtyktina.

– Vit royna at heita á íleggjarar um at tillaga bygningin til føroysk viðurskifti við

> EG SAKNI, AT ÍLEGGJARARNIR DUGA AT SÍGGJA, AT TAÐ, TEIR BYGGJA Í DAG, FER AT STANDA Í 50, 100 ELLA 200 ÁR





eitt nú saðiltaki og tilfarsvali, so at sniðið hóskar betur inn í býarmyndina. Tað eydnast viðhvørt, men ikki altíð.

## Býarsamleiki á vegamóti

– Vit taka ofta Reykjavík sum ræðumynd, har stórir betongkassar eru allastaðni. Vit eru á einum vegamóti: Vilja vit hava ein bý, sum vit eisini eru errin av um 50-100 ár, er sera týdningarmikið, at vit fáa broytt hesa siðvenjuna sum skjótast, sigur Birita Wardum.

Hon skilir væl, at íleggjarar skulu forvinna nakað fíggjarliga, men tað má bera til samstundis at gera nakað gott fyri býin byggilistarliga.

– Eg sakni, at íleggjararnir duga at síggja, at tað, teir byggja í dag, fer at standa í 50, 100 ella 200 ár. At teir skilja týdningin av tí, teir gera. Eg hevði viljað, at tann samvitskan var eitt sindur størri. Ikki allir eru soleiðis. Men sum umsiting kennist tað ofta, sum at vit eru eitt haft um beinini, tá ið vit royna at seta krøv og ynski fram.

## Neyðugt við arkitekturpolitikki

Býararkitekturin metir, at ein arkitekturpolitikkur hevði gagnað væl. Hesin kann t.d. áseta, hvussu byggilistarligu sereyðkennini verða varðveitt og innarbeidd í nýggja bygging.

– Yvirskipað kann ein arkitekturpolitikkur siga, hvat slag av býi og bygging, vit gjarna vilja hava, og tað mangla vit sum kommuna og býur at viðurkenna.

Býráðið hevur samtykt, at farast kann í holt við at gera ein arkitekturpolitikk. Tó ásannar Birita Wardum, at arbeiðið enn ikki er sett á breddan.

## Tørvur á 3.500 nýggjum bústøðum til 2050

Fólkatalið í Tórshavnar kommunu er í miðal vaksið knapt 1,4% um árið síðan 2013. Siga vit, at vøksturin verður tann sami komandi áratíggjuni, búgva gott 33.300 fólk í kommununi í 2050.

Í dag eru knapt 7.900 bústaðir í Tórshavnar kommunu. Við einum árligum fólkavøkstri á 1,4% og eini miðal húskistødd á 2,9 fólk, skulu oman fyri 11.400 bústaðir vera í kommununi í 2050. Tað merkir, at yvir 3.500 nýggir bústaðir skulu útvegast hetta tíðarskeiðið.

***GG:** Tølini eru framrokningar og skulu sjálvandi takast við fyrivarni.*

Kelda: Tórshavnar kommuna

# Íbúðirnar gerast fleiri

Í dag eru 72% av bústøðunum í Tórshavnar kommunu sethús/tvíhús. 18% eru íbúðir, og 10% eru raðhús. Meðan parturin av raðhúsum er óbroyttur síðan 2013, eru íbúðirnar øktar. Í 2013 vóru íbúðirnar bert 10% av bústøðunum, meðan sethúsini/tvíhúsini vóru 79%.

Kelda: Tórshavnar kommuna

## Kommunuætlanin gott amboð

Tá ið bústaðir skulu fyrireikast, er Kommunuætlanin fremsta amboðið. Kommunuætlanin planleggur lendisnýtsluna í kommununi og eyðmerkir økir til framtíðar bústaðabygging. Arbeitt verður bæði við býartætting og meirbygging.

Øll øki kring høvuðsstaðin eru kannað, og tey best egnaðu flokkað sum býarvakstrarøkir. Krøvini til býarvakstrarøki eru m.a. at:

- Tey skulu hanga saman við verandi býarøkjum
- Liggja lægri enn 210 metrar, tí hægsti vatnbrunnurin er í 250 metra hædd
- Vatnveitingar og kloakkleiðingar skulu kunna gerast uttan órímiliga stórar íløgur
- Helst ikki á norðurvendum skráa – við atliti til sólargang og hitalag um veturin

Onnur fyrilit verða eisini tikin, m.a. til velt lendi, varðveitingarverd náttúrulendi og ein møguligan flogvøll á Glyvursnesi í framtíðini.

– Sum heild verður Kommunuætlanin fylgd, og tað er sera positivt, sigur Birita Wardum. Eisini bústaðapolitikkurin frá 2018 er nógv brúktur í fyrireikingini av bústøðum í kommununi.

## Varðveita hús og umhvørvi

Arbeiðið við bústøðum snýr seg eisini um at varðveita gomlu býarpartarnar, sum eru við til at geva býarmyndini ein søguligan samleika.

– Besta dømið um øki, sum er varðveitt í serstakari byggisamtykt, er úti á Reyni. Nógv uppskot vóru um bygging í økinum, men táverandi býararkitektur, Gunnar Hoydal, valdi at gera serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at søgan og søguligu bygningarnir eru varðveitt.

Kommunan gjørdi í 2006 eitt býaratlas yvir varðveitingarverd hús, har øll hús eldri enn 1958 vórðu skrásett. Summi eru ikki til longur ella eru umbygd. Verandi býaratlas er einans ein skráseting og upplýsandi handbók. Serligu økini mangla at verða útnevnd og varðveitt í serstakari byggisamtykt. Eisini eiga nýggjari hús at verða tikin við í skrásetingina, heldur Birita Wardum.

– Vit mugu lofta tí, sum er vert at varðveita, áðrenn tað er ov seint. Vandi er fyri, at onkur keypir fleiri matriklar og byggir ein stóran bygning, tí byggi- og nýtslustigið loyvir tí í almennu byggisamtyktini. Tað er umráðandi at fáa eyðmerkt hesi økini, sum eru serliga virðismikil fyri býin og við byggisamtykt regulera tey, áðrenn mann knúsar tey sundur, sigur Birita Wardum, býararkitektur.

# Bygging má virða mørkini hjá Jørðini

**Home.Earth byggir bústaðir við metlágum $CO_2$-útláti. Nógv er at vinna við at byggja færri fermetrar í part, sigur Kasper Guldager Jensen, arkitektur og ein av stovnarunum av Home.Earth**

– Við bert einum sindri av umhugsni kann $CO_2$-útlátið í bústaðabygging minkast munandi. Munurin á okkara íbúðahúsum og vanligum íbúðahúsum er bert 500 kr meira fyri fermeturin, og tá hava vit minkað $CO_2$-útlátið niður í helvt.

Tað sigur arkitekturin, Kasper Guldager Jensen. Saman við øðrum hevur hann stovnað evropeiska ognarfelagið, Home. Earth, sum mennir bústaðir. Tey arbeiða við 3-faldari botnlinju: Bústaðirnir skulu hava lágt $CO_2$-útlát, vera sosialt fevnandi og nóg bíligir til vanlig fólk. Fyrstu 158 bústaðirnir verða í løtuni bygdir í Høje Taastrup í Keypmannahavnarøkinum.

## Arbeiðsætlan til minking

Kasper Guldager Jensen helt í november fyrilestur í Kongshøll, tá ið Ráðgevarafelagið skipaði fyri ráðstevnu um burðardygga bygging, "From Space to Earth". Boðskapur hansara er, at vit mugu byggja innan fyri mørkini hjá okkara gongustjørnu.

– Burðardygd er ikki lutfalslig. Vit noyðast at vera treytaleys, tí treytaleysi mátistokkurin er jú sjálv Jørðin. Vit noyðast at brúka mørkini hjá Jørðini sum nýggjan mátistokk fyri at kunna kalla eina bygging burðardygga.

Saman við øðrum hevur hann skrivað virðisløntu bókina, "Doughnut for Urban Developement", sum er ein hondbók til ognar- og byggivinnuna um at menna burðardyggar bústaðir. Bókin tekur við sonevndu Reduction Roadmap, sum er ein arbeiðsætlan at minka um $CO_2$-útlátið, og har málini í Paríssáttmálanum eru umsett til árlig $CO_2$-minkingarmál í byggivinnuni. Globalu málini verða skalerað niður á nationalt stig og víðari heilt niður á fermetrar.



> TAÐ ER OVURNÝTSLA AV TILFEINGI AT BYGGJA SETHÚS Á 180 FERMETRAR TIL EIN PERSÓN



– Tað krevur nøkur amboð at flyta eitt globalt stig niður á fermetrar. Men tað megna vit nú. Nú kunnu vit siga, hvussu nógv $CO_2$-útlát hvør fermetur í mesta lagi kann hava, skal byggingin halda seg innan fyri Jarðarinnar mørk.

## Færri fermetrar

Planetary Boundaries, mørkini hjá Jørðini, eru vísindaliga ásett markvirði fyri níggju av vistskipanunum hjá Jørðini, m.a. veðurlag og lívmargfeldi. Farið er yvir um seks av hesum mørkum, og tað økir vandan fyri brádligum og óvendandi umhvørvisbroytingum.

Byggivinnan noyðist at taka hesar ávaringar í størsta álvara. Tí mugu planeteru mørkini setast sum mátistokkur í bygging, sigur Kasper Guldager Jensen.

Ein víðfevnd umlegging má gerast. Um tú bert fylgir galdandi byggikunngerð í Danmark, fer byggingin 10 ferðir upp um planeteru markvirðini.

– Ovurnýtslan í okkara fyrstu bygging svarar til 2,5 gongustjørnur, og tað er ómetaliga nógv. Men samstundis er hetta lægsta $CO_2$-útlát fyri ein bygning í seks hæddum í Danmark. Tað sigur nakað um avbjóðingina. Okkara mál er tó at koma fram ímóti planetpositivari bygging.



Bygningarnir hjá Home.Earth eru úr viði og verða bygdir í modulum á verksmiðju. Á tann hátt fæst mest burturúr tilfeinginum og við góðsku. Bygningarnir hava nógv felagsøki, men færri fermetrar í part.

– Vit byggja í miðal 27 fermetrar fyri hvønn persón, og ikki 57, ið er miðal fyri landið. Hetta ger, at vit koma niður á 5,2 kg $CO_2$-útlát fyri hvønn fermetur árliga.



Byggikunngerðin hevur 12 kg $CO_2$ fyri fermeturin árliga sum minstakrav.

## Annað tilfar

Kasper Guldager Jensen vísir á serliga trý øki, har til ber at minka um $CO_2$-útlátið í bygging: Tilfarið, orkukeldan til upphiting og persónliga fermetratalið.

– Tað er ovurnýtsla av tilfeingi at byggja sethús á 180 fermetrar til ein persón, men betri javnvág, um tað er til seks fólk. Vit mugu umhugsa nýtt tilfar at avloysa betong, múrsteinar og rockwool. Tað er ei heldur burðardygt at hita bústaðin við lívrunnum brennievni. Vit mugu arbeiða við natúrligari orku, endurvinning av hita og nýhugsa allan nýtslupartin av okkara bygningum í mun til burðardygd.

Sjálvt við besta byggitilfarinum røkkur tú ikki á mál. Tú noyðist at sameina øll trý átøkini, og her hava myndugleikar og byggivinna í dag ikki nóg stórt fokus á fermetrar fyri hvønn persón.

## Leiklutur ráðgevans

Ráðgevar hava eina stóra uppgávu í royndunum at byggja burðardygt.

– Uppgávan hjá ráðgevanum er at kunna byggiharran um burðardygd – hvussu byggingin avrikar og at geva byggiharranum íblástur til aðrar møguleikar. Tað haldi eg, at allir byggiharrar hava áhuga í. Serliga tá ið tað, sum í okkara føri, bert kostar 500 kr meira fyri fermeturin at minka útlátið niður í helvt. Soleiðis gerst bygningurin ein betri íløga, um tað er ein professjonellur byggiharri aftan fyri verkætlanina, sigur Kasper Guldager Jensen.

# FINGU OPTIMALT BURTUR ÚR KØRGUM UMSTØÐUM

**Gamla føroyska bústaðabyggingin er hugtakandi. Føroyingar dugdu einastandandi væl at fáa sum mest burtur úr kørgum umstøðum og lítlum byggitilfari, halda Árni Winther, arkitektur og Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur**

Brattar fjallasíður. Mitt úti í Norðuratlantshavi. Stormar, sjórok og regn, sum fær næstan alt at rusta, terast og fúna. Títtu skiftini millum frost og tiðnan, sum bróta niður og elva til sprungur. Einasta byggitilfar er grót, flag og nakað av rekaviði.

Bústaðabyggingin í Føroyum hevði hørð kor. Kortini eydnaðist at menna ein byggihátt her, sum er imponerandi, spyrt tú arkitektin og fólkalívsfrøðingin.

## Kálvar í stovuni

Fyrst var tað ovala langhúsið úr gróti, sum gjøgnum øldir mennist til ymisk húsasløg, har viðurin fær størri innivist, og rúmini gerast fleiri.

– Heilt fram móti 1800-talinum høvdu flestu húsini bert ta einu stovuna, roykstovuna, har øll svóvu, arbeiddu og ótu. Ofta høvdu roykstovan og fjósið somu inngongd, og tað var ikki óvanligt at hava bæði smálomb og kálvar í roykstovuni, sigur Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur

Timbur og seymir vóru mangulvøra, og tí ráddi um at húsast væl.

– Tú nýtti ikki seym til viðin innan. Ístaðin vóru pløðingar at seta veggirnar í, soleiðis at tað var tætt. Einasta staðið, har seymur varð nýttur, var til at festa klædningin uttan. Tá ið viðurin byrjaði at rotna í neðra, varð seymurin loystur og brettið vent soleiðis, at tað varð vart av úthanginum – og so helt tað dupult so leingi, sigur Árni Winther, arkitektur.

## Raffinerað

Eisini onnur viðurskifti hugtaka arkitektin: Hvussu væl alt er útnyttað innan. Takhallið og støddin á úthanginum. Og hvussu húsini eru bygd eftir lendinum.

Hjallar og neyst vóru væl umhugsað. Árni hevur mátað gomul neyst upp, har ryggásin er bogað í miðjuni, har báturin jú er lægstur. Í hjallunum vóru rimarnar so mikið tunnar, at tær tornaðu væl aftur. Tjúkkar rimar torna verri og rotna lættari.

– Tey, sum hava sett seg niður í Føroyum, hava ment ein ekstremt raffineraðan hátt at brúka tilfeingið optimalt. Ja, eitt meistaraverk. Tað kundu vit lært nakað av í dag, sigur Árni Winther.

> TEY, SUM HAVA SETT SEG NIÐUR Í FØROYUM, HAVA MENT EIN EKSTREMT RAFFINERAÐAN HÁTT AT BRÚKA TILFEINGIÐ OPTIMALT





Útsýni, sum fólk ganga høgt upp í nú á døgum, hevði ongan týdning fyrr. Tá varð bygt á heimrustini, har tað var pláss, og tú bygdi eftir ætt og lendi. Sprongt varð ikki, uttan tað var neyðugt. Tá høvdu tey bara krút, og alt skuldi borast við hond, sigur Jóan Pauli Joensen.

## Roykur og bukka

Tosa vit um komfort og hentleikar, kann tað ikki samanberast við dagsins væl bjálvaðu hús við rennandi vatni, vesi, hita í gólvinum og køkum.

– Komforturin kann ikki hava verið nógvur tá. Tú hevði eina song, ein bonk og ein krakk. Vart tú heilt væl fyri, hevði tú eina glasstovu seinni. Ella eina fínastovu, sum fólk næstan ongantíð brúktu, sigur Jóan Pauli Joensen.

Húsini vóru ikki innrættað til persónligt reinføri, og vesi var onki. Menninir loystu sær buksurnar niðri í fjøruni ella úti á bønum, meðan kvinnurnar hjálptu sær sum frægast innandura. Seinni fingu húsini bukku í kjallaranum. Ikki fyrr enn eftir 1950 gjørdist vanligt við vesi og baðikari, sigur hann.

Roykurin frá opna eldstaðnum, gjósturin og vætan vóru støðugir trupulleikar fyri andaleið, giktasjúkur o.a. Við tíðini kemur meira timbur í húsabyggingina, og tá gerast húsini turrari og meira komfortabul, sigur Árni Winther.

Hóast smátt og vátt heldur Árni Winther tó, at gomlu føroysku húsini gjørdu, at fólk yvirlivdu. So við givnu fortreytunum fekk mann optimalt burturúr.

## Prestagarðar sum influensarar

Útlendsk rák ávirkaðu byggilistina, og fólk fingu íblástur frá hvørjum øðrum. Tey ríku vóru vanliga fyrst við tí nýggja, t.d. embætisfólk og prestagarðar. Tú kanst siga, at tey vóru tátíðarinnar influensarar, sigur Jóan Pauli Joensen.

Slupptíðin og nýggju handlarnir hava stóra ávirkan húsabygging og innrætting. Ein nýggj borgarastætt veksur fram – handilsmenn, reiðrar, lærarar o.o. Meira fæst í handlunum, og fleiri fáa ráð til hentleikar.

Summir handverkarar vóru á byggimeist-araskúla í Danmark og Noregi. Vallekilde-háskúlin í Danmark hevur sett stóran dám føroyska húsabygging, siga Árni og Jóan Pauli.

Vallekilde hevði timburdeild, og har lærdu nógvir føroyingar at smíða. Sonevndu krossplanhúsini, sum serliga vórðu bygd frá 1900-1950, stava haðani. Øll høvdu somu skipan: Dagligstova, spísistova, kamar og køkur við kaminu í miðjuni. Við sentralhitanum broyttist húsasniðið, tí tá var óneyðugt at byggja eftir kaminuni.



## Í dag og framtíðin

Hóast møguleikarnir innan húsabygging í dag eru óteljandi, bæði við tilfari, handverki og fíggjarliga, sæst tað ikki nóg væl aftur, heldur Árni Winther. Alt líkist, og ofta er tað talentleyst. Til dømis skulu øll hava hesi svørtu vindeyguni og einsíðu takhall.

Arkitekturin saknar meiri planlegging frá myndugleikunum og størri tilvit um, hvar vit eru stødd. Ofta verður bygt ímóti bæði lendi og veðurlagi. Tað er t.d. ikki av tilvild, at kjallarar í Klaksvík verða fyltir av skriðulopi. Tað er tí, at fólk ganga ímóti givnum fortreytum, og tað gevur bakslåttur, sigur arkitekturin.

– Fyrr hevði tú sera avmarkað tilfar og amboð. Tú kundi ikki spreingja eitt fjall burtur og heldur ikki stoypa hvat sum helst. Avmarkandi umstøðurnar gjørdu, at tú onkusvegna fekst ein samanhang. Vit skulu ikki romantisera fortíðina, men tú fekst ein kvalitet, tí tað var ein heild, og tú dugdi at brúka tilfeingið optimalt. Og tað haldi eg, at vit fullkomiliga hava mist í dag, sigur Árni Winther.

Hvussu føroysku húsini síggja út um t.d. 40 ár, er trupult at meta um. Tó fara broyttu familjumynstrini við eitt nú fleiri støkum og eldri at síggjast aftur í byggingini, halda Jóan Pauli og Árni.

Orkumøguleikar og veðurlagsbroytingar fara eisini at ávirka. Og tøknin sjálvandi. Nú verður tosað um 3D-prentað hús. Verður tann tøknin atkomilig, fáa vit heilt aðrar møguleikar, sigur Árni Winther.



# Fyrstu DGNB-sertifiseraðu bústaðir í Føroyum

**Gongst sum ætlað, kunnu fólk um eini tvey ár flyta inn í fyrsta DGNB-sertifiseraða bygningin í Føroyum.**

Talan er um ein íbúðabygning við 41 íbúðum í einum nýggjum íbúðarøki, Miðhorn, sum Articon og SNA eru í gongd við at menna eystan fyri Norðasta Horn. Samlaða verkætlanin fevnir um 105 bústaðir í smærri og størri bygningum. Har vera tilsamans 84 íbúðir og 21 raðhús.

SNA og Articon arbeiða við at fáa ein av hesum íbúðabygningunum sertifiseraðan eftir DGNB-skipanini, og væntandi verður bygningurin undangóðkendur í næstum.

## Meirvirði fyri fleiri

– Ein DGNB-sertifisering er avgjørt eitt meirvirði hjá teimum, sum skulu búgva í íbúðunum. Eisini er ein slík sertifisering áhugaverd hjá bankum og øðrum, sum veita lán til byggiverkætlanir, sigur Bjarni Justinussen, verkætlanarleiðari hjá SNA.

Hann er byggifrøðingur og master í bygningsfysikk. Síðan 2016 hevur hann starvast hjá SNA, og saman við starvsfólki hjá Articon hevur hann ábyrgdina av DGNB-sertifiseringini.

Hugskotið at royna at fáa íbúðirnar sertifiseraðar eigur Articon, sigur Bjarni Justinussen. Articon ognaði sær økið á Miðhorni í 2021, og síðani hevur SNA teknað og ment bústaðaøkið saman við teimum.

## Stór verkætlan

Av tí at hetta er fyrstu ferð, at DGNB-sertifisering verður roynd í Føroyum, hava Articon og SNA gjørt av, at bert ein partur av samlaðu verkætlanini á Miðhorni skal sertifiserast – nevniliga hesin íbúðabygningurin við 41 íbúðum. Hetta er tann størsti av bygningunum og er tilsamans 5.580 fermetrar til støddar.

DGNB hevur fleiri stig av sertifisering: silvur, gull og platin, umframt serligar



ískoytisviðurkenningar, m.a. fyri arkitektur og trivnað. Miðað verður eftir at flokka íbúðabygningin á Miðhorni til silvur.

– Fert tú eftir gulli ella platini, er arbeiðið munandi meira umfatandi. Tá skalt tú t.d. taka endabrúkaran inn í fyrireikingina, longu áðrenn fyrsta strikan er teknað, sigur Bjarni Justinussen.

## Um DGNB

DGNB er burðardygd á formli.

Soleiðis lýsir danska Rådet for Bæredygtigt Byggeri skipanina. DGNB er ein sertifiseringsskipan – eitt góðskustempul – til m.a. bygningar og býarøki. DGNB (Deutsche Gesellschaft für Nachhaltiges Bauen) hevur sín uppruna í Týsklandi. Kring heimin finnast fleiri sertifiseringsskipanir innan burðardygga bygging, men í Danmark hevur byggivinnan valt at brúka ta týsku.

DGNB tekur støði í heimsmálunum hjá ST. Skipanin sær burðardygd sum eina heild, og sertifiseringin leggur seg ikki bert eftir umhvørvisliga partinum, men snýr seg t.d. eisini um sosiala og fíggjarliga burðardygd. Stigini verða givin eftir fimm høvuðsatlitum: Prosess, umhvørvi, fíggjarlig, sosiokulturell/funktionell og teknisk atlit.

## Nógvar útrokningar

Krøvini í DGNB eru munandi størri enn tey, sum almenni myndugleikin setir til bygging, sigur Bjarni Justinussen.

Ein bygging, sum lýkur minstukrøvini í nýggjastu donsku byggikunngerðini (BR18), skorar bara 16-17% í DGNB. Føroyska byggikunngerðin, BK17, byggir á eina 2010-versjón av donsku byggikunngerðini og hevur linari krøv enn galdandi donsku.

Sertifiseringin inniber eina ørgrynnu av útrokningum og skjalfestingum, alt við tí endamáli at finna burðardyggastu loysnirnar, sigur Bjarni Justinussen.

> **EIN DGNB-SERTIFISERING ER AVGJØRT EITT MEIRVIRÐI HJÁ TEIMUM, SUM SKULU BÚGVA Í ÍBÚÐUNUM**

Hetta er m.a. kostnaðurin av bygninginum í samlaðu livitíðini - tilfar, bygging, rakstur næstu 50 árini, og at taka bygningin niður aftur. Eisini verður hugt at samlaða $CO_2$-útlátinum, t.d. útlát frá framleiðslu av tilfari, bygging, rakstri og niðurtøku.

Tú skalt harumframt skjalfesta, hvaðani tilfarið kemur, og hvussu tað er framleitt. Útrokningar skulu gerast av orkurammu og inniumhvørvi, m.a. við ljóðkrøvum og avgassing frá máling og lími. Lívmargfeldi, drekkivatn, útsýni, atkoma hjá rørslutarnaðum o.s.fr. skal skjalfestast, og verkætlanin fær eisini stig eftir, um fyritøkurnar hava lærlingar og fólk við serligum tørvi í starvi.

## Sertifisering er framtíðin

– Tað snýr seg um at lyfta tað upp á eitt hægri stig enn bara at siga, at hetta er burðardygt. Vit skulu prógva tað. Vit skulu eftirvísa alt, sum vit gera, sigur Bjarni Justinussen.

Hann er sannførdur um, at vit fara at síggja nógvar sertifiseringar í føroyskari bygging í árunum sum koma. Serliga yngra ættarliðið spyr eftir burðardyggum loysnum.

-Krøvini, sum fólk seta til bygningar, tey skulu búgva í, gerast størri og størri. Vit gerast meira tilvitað um, at vit ikki skulu brúka óneyðuga orku, og tilfarið skal helst vera sertifiserað tilfar, sum ikki útruddar skógir o.s.fr.

Bjarni Justinussen sigur, at ávísar byggibúðir eru farnar at laga sínar skipanir til tey krøvini til skjalfesting, sum eru í sertifiseringsskipanum.



# Privatu kundarnir fyltu mest í 2022



## Ongantíð áður hevur privata vinnan verið so stórur partur av kundaskaranum hjá ráðgevaravinnuni. Størsti parturin av uppgávunum fevndi um bygningar

Nógv tann størsti kundabólkurin hjá ráðgevaravinnuni í 2022 var tað privata. Tað vísir kanning hjá Ráðgevarafelagnum.

43% av kundunum vóru frá privatu vinnuni, 26% frá kommunala geiranum og 16% frá tí almenna. 15% eru skrásett sum "Annað".

Tølini hjá Ráðgevarafelagnum ganga aftur til 2011. Hesa tíðina hevur privati kundaparturin ongantíð verið so stórur sum í 2022, og samstundis vóru bæði kommunali og almenni geirin metlágir hetta árið.

### Mest bygningar

Nógv tær flestu uppgávurnar snúðu seg um bygningar – 63 prosent. Anleggsuppgávurnar fyltu 29% og planlegging bert 3%.

Býtið av uppgávum sveiggjar gjøgnum árini, men tó hava bygningar altíð fylt mest. Til dømis vóru bygningar 70% av uppgávunum árini 2014 og 2016, meðan teir vóru 51% í 2019, sum er lægsti parturin fyri bygningar.

### Næstan helvtin uttan loft

Taka vit samsýningarformin, so vóru heili 48% tímar uttan loft, og tað er tað mesta nakrantíð við hesum samsýningarháttinum. 39% var fastprísur (tilboð), og hetta er tað minsta nakrantíð við føstum prísi. Tímar við lofti vóru 13%.

Samlaði umsetningurin hjá limunum í Ráðgevarafelagnum í 2022 var slakar 234 mió. krónur, og tað er tað mesta nakrantíð.

Ikki allir limirnir hava svarað kanningini hjá Ráðgevarafelagnum. Svarluttøkan var 57,3 prosent hesaferð. Samlaði umsetningurin er ein meting og skal tí takast við ávísum fyrivarni.









# Hesir limir eru í Ráðgevarafelagnum:

- Afry Føroyar
- Arkitektar 99 v/Jóhan Laksafoss
- Brim Arkitektar
- Byggitrygd
- Drauschke Consult Føroyar
- EYA Arkitektur Design
- Farcon
- Fjalar
- FORMO
- Fuglark
- Henning Larsen NA
- HMP Consult, Ráðg. verkfrøðingar
- Kontrast
- Landsbyggifelagið
- Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving
- MAP Arkitektar
- Martin E. Leo – Ráðg. verkfrøðingar
- PB Consult
- Ráð
- Sámal Johannesen
- Selmar Nielsen Arkitektar
- SMJ Ráðgevandi Verkfrøðingar
- Spenn
- Steingrund Akustik
- Zeta Architects

RÁÐGEVARAFELAGIÐ